Kyndil-Sóljan 28-29 (17-14):

# Sóljan gevst ikki

**Vágagenturnar í Sóljuni vunnu seg av niðasta sessinum, tá tað eydnaðist at fáa bæði stigini í botnuppgerðini móti Kyndli**

HONDBÓLTUR – KVINNUR

*Jákup Mørk*



*Gleðin á Sóljuni var sjónlig, tá sigurin endiliga var ein staðfesting. Nú eru vágagenturnar kanska tær, sum hava bestu kortini á hondini í niðurflytingarstríðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsne*

Tað var einki at taka seg aftur í, at Kyndil var favorittur, tá tær sunnudagin skuldu taka ímóti Sóljuni. Eisini hóast spælið hjá Kyndli hevur verið rættiliga óstøðugt í ár, tí mett leikarar fyri leikara, so skuldu tær grønu verið væl betri enn tað, sum stigatalvan sigur.

Tað eydnaðist tó ikki hjá Kyndli at fáa tey bæði stigini, sum endaligt kundu lyfta liðið av botnsessinum. Tvørtur ímóti fullu tær aftur um Sóljuna, og sum støðan sær út í løtuni, so kann Kyndil væl koma í tað støðu, at tey ikki hava nakað kvinnulið í bestu deildini komandi kappingarár.

Tað var fyrst og fremst grundað á ein framúrskarandi stríðsvilja, at tað eydnaðist Sóljuni at vinna dystin. Megin partin av tíðini vóru tað nevnliga tyær á heimaliðnum, sum vóru við yvirlutan. Við einari partvísari mansverju av litaviska stórskjúttanum hjá Sóljuni byrgdu tær fyri stórstu álopshóttanini, og í Lotte Sørensen og Anniku Ljósstein hevði liðið so leikararnar, sum meira ella minni vórðu útnevndar til at avgera dystin..

Fyrsta góða hálva tíman ella so tóktist hetta at bera á rætta borðið. Kyndil tók seg spakuliga alt longur fram, og tá tær stutt inn í seinna hálvleik øktu munin í fimm mál, tóktist sigurin at vera teimum vísur.

Tað eydnaðist tó Sóljuni at koma aftur í aftur. Meðan toppskjuttin, Asta, varð mansvard, tóku serliga Marjun Johansen og Hertha Simonsen nú málið í egnar hendur. Ferð eftir ferð brutu tær ígjøgnum grønu verjuna, sum ikki altíð var nóg væl skipað, og tíggju minuttir fyri leiklok høvdu tær vunnið seg framum.

Tað er tó ikki ov nógv sagt, at Kyndil hevði møguleikarnar at taka alt aftur. Tær fingu aftur meira ferð á, og fleiri brotskøst spurdust burturúr, men tá fýra av hesum verða misnýtt innan eina somikið avgerandi løtu í dystinum, so kann ein sigur neyvan krevjast.

Her dugdu tær hjá Sóljuni betri at halda høvdið kalt. Ikki minst Asta, sum annars misnýtti eitt brotskast við støðuna 27-27. Stutt fyri leiklok fekk hon enn einaferð møguleikan av sjey metrum, og hesa ferð sveik hon ikki, men langaði bóltin í meskarnar.

Við sigrinum styrkti Sóljan av álvara um møguleikan at hanga í bestu deildini. Ikki bara lyftu tær seg av niðasta sessinum, men tær hava nú leikt báðar útidystirnar móti hinum botnliðunum. Tað vil siga, at bæði StÍF og Kyndil hava á láni at ferðast til Giljanes, og við fyrimuninum av heimavøllinum tykjast vágagenturnar brádliga at vera tær, sum standa sterkasta í botnstríðnum.



*Ikki minst var Tað Marjun Johansen fyri at takka, at Sóljan í seinna hálvleiki megnaði at stríða seg inn aftur í dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hjá Kyndli sær hinvegin einki serligt út. Í øllum førum ikki, um leikararnir ikki taka annað skinn um bak til komandi dystirnar. Tað mundi vera fá, sum roknaðu við, at liðið fór at liggja somikið niðarliga í ár, tí fólkið er so avgjørt til staðar. Fleiri av leikarunum teljast so avgjørt millum tær bestu í landinum, men uttan neyðuga stríðsviljan røkkur hetta ikki.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-sóljan 28-29 (17-14)**

Málskjúttar:
Kyndil: Lotte Sørensen 10(4), Annika Ljósstein 8(1), Palma PEtersen 4, Ann Hansen 2, Ann Mari Wang 1, Marjun Tróndarson 1, Rakul Joensen 1
Sóljan: Asta Petrauskiene 10(2), Marjun Johansen 7, Hertha Simonsen 7, Heidi Maria Akselsen 5, Jóhanna í Horni 1
Brotskøst: Kyndil 9, Sóljan 3
Útvísingar: Kyndil 4, Sóljan 5
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen & Kristian Johansen. Megnaðu at halda kalt seinastu løtuna, tá tað annars stóð sera nógv á øllum pørtum.

## Trýst á venjaranum

Tað ljóðaði beint eftir dystin millum Sóljuna og Kyndil, at venjarin hjá Kyndli, Rógvi Nielsen, hevði sagt seg úr sessinum.

Allar helst var hetta grundað á laku úrslitini, sum liðið hevur havt í ár, og sum nú eisini hevur viðført, at liðið er í veruligum vanda fyri at missa sætið í bestu deildini.

Tað bar tó ikki til at fáa váttað tíðindini, tá vit sunnukvøldið royndi at fáa eina viðmerking frá venjaranum.

- Í løtuni fái eg ikki gjørt nakrar viðmerkingar til hatta, var einasta viðmerkingin, sum var at fáa, so okkurt er helst um tosið, hóast endaliga avgerðin tykist bíða í løtuni.

Møguliga verður meira at frætta um hetta seinni í vikuni.

**-jm**



# Julian avgjørdi

Hull City spældi leygardagin á útivølli móti Halifax, sum er á niðasta sessinum í ensku triðju deild.

Hull spælir hinvegin fyri uppflytan til 2. deild, og størsta partin av dystinum var tað eisini sjónligt, at munur var á liðunum. Tað gekk tó leingi sera striltið hjá Hull at fáa málið, sum kundi avgera dystin til teirra fyrimun.

Nakrir góðir møguleikar vórðu misnýttir, men tá teir so fingu hornaspark í 38 minuttir bragdaði. Bólturin varð sendur nær inn móti málinum, og har eydnaðist Julian Johnsson at toyggja seg framum málverjan hjá heimaliðnum og stýra bóltin í kassan.

Restina av dystinum ráddi so bert um hjá Hull at halda fast, og yvir høvur varð hetta gjørt uttan teir stóru trupulleikarnar. Í yvirtíðini var tó um reppið, at alt skrambladi saman.

Eitt heldur marghåttligt mistak viðførdi, at álopsleikari hjá Hull kom at sparka bóltin langt oman móti egnaru hálvu. Álopsleikari gjørdist leysur við málverjanum hjá Hull, men við eini flottari dupultbjarging vórðu stigini kortini vard, og enn hevur Hull møguleikan at tryggja sær beinleiðis uppflytan í aðru deild. Skal tað eydnast, skulu Julian og teir upp á trijða plássið í deildini, og hetta er í løtuni fýra stig burturi.

**-jm**

### Hollendska toto-deildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excelsoir + | 21 | 14 - 5 - 2 | 49 | 17 | 32 | 47 |
| 2 | FC Zwolle | 21 | 13 - 5 - 3 | 37 | 23 | 14 | 44 |
| 3 | Emmen | 21 | 12 - 5 - 4 | 35 | 20 | 15 | 41 |
| 4 | ADO Den Haag | 21 | 11 - 6 - 4 | 34 | 20 | 14 | 39 |
| 5 | RBC Roo'daal | 21 | 11 - 5 - 5 | 45 | 26 | 19 | 38 |
| 6 | Cambuur/L. + | 21 | 10 - 4 - 7 | 32 | 24 | 8 | 34 |
| 7 | BV Veendam | 20 | 9 - 5 - 6 | 35 | 31 | 4 | 32 |
| 8 | FC Volendam | 21 | 9 - 3 - 9 | 38 | 30 | 8 | 30 |
| 9 | Haarlem | 21 | 8 - 6 - 7 | 27 | 28 | -1 | 30 |
| 10 | Dordrecht '90 | 20 | 8 - 5 - 7 | 39 | 31 | 8 | 29 |
| 11 | G.A. Eagles | 21 | 6 - 7 - 8 | 31 | 39 | -8 | 25 |
| 12 | VVV | 21 | 7 - 2 -12 | 37 | 42 | -5 | 23 |
| 13 | Helmond Sp. | 21 | 5 - 8 - 8 | 21 | 31 | -10 | 23 |
| 14 | Storm/Telstar | 21 | 5 - 7 - 9 | 29 | 29 | 0 | 22 |
| 15 | Heracles A. | 21 | 6 - 4 -11 | 27 | 33 | -6 | 22 |
| 16 | MVV | 21 | 5 - 5 -11 | 29 | 39 | -10 | 20 |
| 17 | Eindhoven | 21 | 2 - 5 -14 | 24 | 55 | -31 | 11 |
| 18 | Top/Oss | 21 | 2 - 3 -16 | 16 | 67 | -51 | 9 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«

Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

# Todi spælir aftur

Todi Jónsson var millum teir fyrstu 11, tá FCK um vikuskiftið spældi málleysan javnleik í vinardysti móti svenska Halmstad.

Saman við Carsten Fredgaard var føroyski landsliðsmaðurin á toppinum frá byrjan, men sum skilst, so kom ikki tað stóra burturúr. Á báðum liðum vóru tað nevnliga verjurnar, sum stóðu seg best, og tað gevur so eisini teimum í FCK nakað at fegnast um. Eftir sølurnar av Niclas Jensen, Jacob Laursen og Thomas Rytter var verjuparturin annars hann, sum voldaði venjaranum størsta høvuðbrýggi.

Í dag fer hópurin hjá FCK til Suðurafrika, har FCK eigur eitt felag, og har leikararnir vanliga fara at venja í køldu donsku vetrarmánaðunum, og ivaleyst verður meira at frætta frá Toda og teimum komandi dagarnar.

**-jm**



*Eftir drúgvan skaðasteðgt var Todi endilga aftur á vøllinum, tá FCK um vikuskiftið spældi málleysan javnleik móti Halmstad*

### Enska 3. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 30 | 18 - 7 - 5 | 44 | 23 | 21 | 61 |
| 2 | Luton | 30 | 17 - 6 - 7 | 59 | 38 | 21 | 57 |
| 3 | Mansfield | 29 | 16 - 6 - 7 | 46 | 29 | 17 | 54 |
| 4 | Hull C. | 31 | 14 - 8 - 9 | 44 | 31 | 13 | 50 |
| 5 | Rochdale | 30 | 13 - 10 - 7 | 40 | 32 | 8 | 49 |
| 6 | Shrewsbury | 32 | 13 - 8 -11 | 44 | 39 | 5 | 47 |
| 7 | Scunthorpe | 31 | 12 - 10 - 9 | 56 | 40 | 16 | 46 |
| 8 | Kidderm. | 29 | 13 - 6 -10 | 36 | 28 | 8 | 45 |
| 9 | R&D | 31 | 12 - 9 -10 | 40 | 38 | 2 | 45 |
| 10 | Cheltenham | 28 | 11 - 11 - 6 | 40 | 34 | 6 | 44 |
| 11 | Exeter | 30 | 11 - 8 -11 | 33 | 46 | -13 | 41 |
| 12 | Southend | 30 | 11 - 7 -12 | 36 | 34 | 2 | 40 |
| 13 | Hartlepool | 28 | 11 - 6 -11 | 41 | 31 | 10 | 39 |
| 14 | Darlington | 29 | 10 - 7 -12 | 35 | 40 | -5 | 37 |
| 15 | Oxford Utd. | 31 | 8 - 11 -12 | 39 | 41 | -2 | 35 |
| 16 | Bristol R. | 29 | 9 - 8 -12 | 29 | 34 | -5 | 35 |
| 17 | Macclesfield | 30 | 8 - 9 -13 | 27 | 38 | -11 | 33 |
| 18 | Lincoln C. | 29 | 7 - 11 -11 | 30 | 39 | -9 | 32 |
| 19 | Swansea | 30 | 8 - 8 -14 | 35 | 46 | -11 | 32 |
| 20 | Carlisle | 28 | 7 - 10 -11 | 31 | 33 | -2 | 31 |
| 21 | Leyton O. | 29 | 8 - 7 -14 | 40 | 52 | -12 | 31 |
| 22 | Torquay | 31 | 7 - 10 -14 | 28 | 46 | -18 | 31 |
| 23 | York | 27 | 7 - 7 -13 | 30 | 46 | -16 | 28 |
| 24 | Halifax | 30 | 5 - 10 -15 | 22 | 47 | -25 | 25 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)

# Zwolle góða byrjan

Í Hollandi eru teir nú farnir undir seinnu hálvu av kappingarárinum, og ikki kann sigast annað enn, at Zwolle hevur fingið eina stak góða byrjan.

Hetta vikuskiftið spældu Súni og teir á útivølli móti Heracles, og annan dystin á rað eydnaðist Zwolle at tryggja sær øll stigini.

Súni Olsen kom á vøllin stutt fyri hálvleik, men leingi var líkt til, at hann saman við liðfeløgunum skuldi taka til takkar við einum einsamøllum stigi.

Í seinasta minuttinum eydnaðist tó Roelofsen at senda bóltin inn um málverjan hjá Heracles, og sum vera man var frøin stór á leikarunum úr Zwolle. Eftir ein lítlan niðurtúr í heyst var annars líkt til, at teir fullkomuliga høvdu mist oddasessin úr eygsjón, men nú eru bert fýra stig upp til Excelsoir og beinleiðis uppflytingarsessin, og enn eigur Zwolle heimadyst móti Excelsoir til góðar.

**-jm**

# Enn eitt avboð

Tað verður eitt munandi skert fótbóltslandslið, sum mikudagin fer til Cypros, har árliga venjingarlegan skal haldast í ár.

Efitr at Hans Fróði Hansen beint undan vikuskiftinum boðaði frá, at hann ikki fekk veirð við á ferðini, hevur Jógvan Martin Olsen nú fingið enn eitt avboð. Talan er um Øssur Hansen, sum annars er ein av mest royndu leikarunum á landsliðnum, og sum eisini hevur verið liðskipari ta einu ferðina.

Ístaðin fyri teir báðar hevur virkandi landsliðsvenjarin tikið Sámal Joensen úr GÍ og Palla Augustinussen úr VB út.

**-jm**



*Øssur Hansen hevur nú eisini givið avboð til venjingarleguna hjá fótbóltslandsliðnum*

## B68 fær pólskan málverja

Á heimasíðuni hjá felagnum, www.b68.fo, sigur B68 frá, at ein pólverji fer at vera álitið í málinum komandi kappingarár.

Talan er um 32 ára gamla Jacek Przybilski, sum áður hevur vart málið hjá Wisla Krakow í bestu pólsku deildini.

Nýggi málverjin kemur ætlandi til landið hósdagin í hesi vikuni, og fer tá alt fyri eitt undir venjingina saman við nýggju liðfeløgum sínum á Toftum.

**-jm**